# 54 dagar til Sissal

**Sissal reyk hóskvøldið út av Big Brother húsinum við 52% av atkvøðunum**

BIG BROTHER
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Við nógv teimum flestu atkvøðunum reyk føroyska Sissal út úr eygleidda húsinum í Mileparkini í Keypmannahavn. Meira enn helvtin at teimum, sum høvdu atkvøtt, valdu at senda Sissal úr Big Brother húsinum hóskvøldið. Sissal fekk nevniliga 52% av atkvøðunum, heili 20% fleiri atkvøður enn sjeikurin, Robert, sum var næstur í røðini.

Sissal fekk 54 dagar inni í húsinum, og tá hugsað verður um, at tað bert eru smáar tvær vikur eftir til finaluna, so er tað ikki so heilt galið.

- Eg havi tað fínt. Eg visti tað altíð. Eg havi vitað tað alla vikuna, segði Sissal við Lisbeth Jannike, Big Brother vertin, beint eftir, at hon varð "leyslatin".

Føroyski luttakarin virkaði púra rólig og væl fyrireikað, í og við at hon varð send út úr húsinum. Og sjálvt um fólk blakaðu egg eftir henni, tá hon koyrdi framvið áskoðarunum, sum vóru komnir at fylgja við uttanfyri húsið, so nervaði hetta hana ikki tað stóra.

## Gjørt nógv burturúr

Nógv varð gjørt burturúr, at parið, Sissal og Robert, vórðu tvey av teimum, sum kundu rúka út. TV Danmark 2 hevði fingið fatur á einum sexologi, sum millum annað segði, at Sissal var ein "drama-queen", "brokhoved" og ein, sum leggur alla ábyrgd frá sær. So skoðsmálið frá serfrøðinginum var ikki í topp.

Harafturat var útvarpsverturin, Kári Sólstein í sjónvarpsstudionum, har Lisbeth Jannike tosaði við hann um, hvussu Big Brother sendingin er móttikin í Føroyum.

Tað má sigast, at Sissal hevur verið ein av teimum persónunum, sum hevur gjørt mest um seg í húsinum. Longu fyrsta kvøldið pissaði hon á gólvið, og tá hon slapp at síggja eitt samansett filmklipp av teimum 54 døgunum í húsinum, var hennara einasta viðmerking:

- So eg havi veruliga pissað á gólvið?

Tveir teir seinastu dagarnar hevur eisini verið tosað um giftarmál í eygleidda húsinum. Og tað skuldu sjálvandi verða Robert og Sissal, sum skuldu giftast. Big Brother kom enntá við tveimum trúlovilsisringum, um Robert vildi niður á knø.

Men Big Brother ævintýrið fyri føroysku Sissal er so úti á hesum sinni.

- Eg havi fingið nøkur fantastisk upplivilsir, og eg havi ongantíð angrað, at eg havi verið við, segði Sissal.

Eftir ætlan, so verður ein samrøða við Sissal við í blaðnum týsdagin.







## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri svágur, pápabeiggi, mammubeiggi, abbabeiggi og ommubeiggi okkara

**Edmund Gærdum**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Jógvan prest og kirkjutænarar.
Tøkk til berarar, sangarar og tykkum, sum hjálptu til við ervinum. Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur til Sjóvar kirkju.
Tøkk øll somul, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Tey avvarðandi**

## Koyrið við Maersk Air

Um tú hevur ein Maersk Air bannara á bakrútinum á bili tínum, kanst tú vinna ferðaseðlar til ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air. Drigið verður millum luttakararnar og tey hepnu kunnu vænta sær vitjan av Maersk Air. Hava tey tá bannaran á bilinum, vinna tey.

**1. vinningur** 2 ferðaseðlar til eitt ferðamál á rutunetinum hjá Maersk Air umvegis Keypmannahavn. Til dømis Athen, París, Barcelona ella Milano
**2. vinningur** 2 ferðaseðlar til London
**3.–5. vinningur** 2 ferðaseðlar til Keypmannahavnar/Billund
**6.–10. vinningur** Ítróttartaska

**Vitja eisini okkara nýggja handil á www.maersk-air.fo**
Tú kanst melda teg til og heinta bannaran á skrivstovuni hjá Maersk Air í Havn. Ella vit kunnu senda hann við postinum. Seinasta freist at melda seg til er 17. november 2003. Vinnararnir verða funnir síðst í desember 2003.
Maersk Air · Handilskjarnin · FO-100 Tórshavn · Tel.: 35 74 74 · Fax: 35 74 75

MAERSK AIR
It's got to be perfect



# Hoyvíkar skúli borðreiðir við sunnum mati

**Royndartiltakið við sunnum mati til næmingarnar er so væl eydnað, at skúlin fer at halda fram við tí. -Tað verður nógv tosað um sunnar matvanar hjá børnum, og at tey ofta ganga svong í skúlanum, og tí mettu vit, at tað kundi verða skilagott at bjóða børnunum sunnan mat í skúlatíðini, sigur skúla-stjórin í Hoyvík, Birgit Arge**

SUNNUR MATUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hoyvíkar skúli er farin undir eitt rættiliga spennandi royndartiltak við sunnum mati til næmingarnar í skúlanum. Royndartiltakið varar í seks vikur, og endar 12. desember. Næmingarnir fáa frukt og skúlabreyð, og tiltakið er so væl móttikið, at leiðslan í skúlanum hevur longu avgjørt at halda fram við sunna matinum, eftir tær seks royndarvikurnar eru farnar.

Skúlastjórin í Hoyvíkar Skúla, Birgit Arge, greiðir frá, at skúlin hevði sett sum mark, at minst 50 næmingar skulu tekna seg til royndartiltakið, um tað skuldi setast í verk.

Heili 265 næmingar hava teknað seg, og tað er væl meir enn væntað. Í dag ganga 430 næmingar í Hoyvíkar Skúla, og fyrsti flokkur er ikki fevndur av skipanini, so 265 næmingar av 360 hava tikið tilboðnum frá skúlanum, og tað er ikki heilt lítið.

- Tað verður nógv tosað um sunnar matvanar hjá børnum, og at tey ofta ganga svong í skúlanum, og tí mettu vit, at tað kundi verða skilagott at bjóða børnunum sunnan mat í skúlatíðini, sigur Birgit Arge



*Børnini í Hoyvíkar skúla dáma sera væl at fáa sunnan mat í skúlanum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Søkja stuðul

Tær seks royndarvikurnar rindar skúlin fyri skúlabreyðini og fruktina til næmingarnar. Eftir royndarvikurnar er ætlanin, at foreldrini sjálvi gjalda fyri sunna matin hjá børnum teirra.

Kostnaður fyri eitt skúlabreyð er 3,40 krónur, meðan fruktin kostar 2,25 krónur. Ynskja foreldrini, at børnini skulu fáa sunnan mat í skúlanum, verður mannagongdin, at tey gjalda skúlanum fyri frukt og skúlabreyð, har skúlin so fær matin til høldar.

Hoyvíkar skúli hevur møguleika at søkja um stuðul frá bæði landi og kommunu til slík tiltøk, og sambært skúlastjóranum ætlar Hoyvíkar skúli at troyta henda møguleika, so kostnaðurin gerst enn bíligari.

## Raskir næmingar

Í løtuni hevur Hoyvíkar skúli ikki umstøður til eina cafeteria, har næmingarnir kunnu fáa fatur á mati í skúlatíðini. 7. floksnæmingar hava tí hesar vikurnar hjálpt til við at býta sunna matin út til næmingarnar á skúlanum.

– Í løtuni hava vit ikki umstøður til tað stóra, og tí hjálpa teir elstu næmingarnir (gongur upp til 7. flokk, blðm) á skúlanum við at býta matin út, og tey hava verið óførr. Vit hava heldur ikki umstøður til, at gera nakað við matin, og tí verður hann býttur út júst í sama líki sum vit fáa hann inn gjøgnum dyrnar, greiðir Birgit Arge frá.

Fruktin verður keypt frá P/F Poul Michelsen heilsølu og skúlabreyðini frá bakarínum hjá Gunnleivi. Næmingar í Hoyvíkar Skúla fáa matin inn í flokshølini í øðrum tíma.




GSM FRÍTÍÐ

| | Teletíð | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovnan | 300,-* | 0,- |
| Mánaðargjald | 0,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 3 kr/min | 2,25 kr/min |
| Samrøður - kvøld | 2 kr/min | 0,75 kr/min |
| SMS-boð | 0,75 | 0,50 |

*íroknað kr. 100,- talutíð

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum